## DAGSINS MEINING

# Yvirtøkulógin

Yvirtøkulógin er endaliga samtykt á løgtingi, men tað gekk, sum øll vita, ikki friðarliga fyri seg. Orðaskiftið var óvanliga hvast og til tíðir lá tað á einum støði, ið ikki er sømiligt fyri tingmenn. Samgongan var samd og stóð sum ein maður, meðan andstøðan var í øðini og royndi av øllum alvi at forða lógini at verða samtykt. Ein hevur varhugan av, at tað, sum andstøðan er ill um, er meira viðmerkingarnar enn sjálvur lógarteksturin ella tekstirnir, tí her er jú talan um tvær einsljóðandi lógir. Tað má eisini ásannast, at tað er óheppið, at samsvar ikki er millum føroysku og donsku viðmerkingarnar. Spurningurin er, um ikki landstýrið hevði staðið seg við at brúkt nakrar mánaðir afturat til at mýkja støðuna mótvegis Danmark so væl sum mótvegis andstøðuni. Um hetta hevði givið eitt samt løgting, so var nógv vunnið og samgongan hevði staðið ómetaliga nógv sterkari.

Ein slík loysn skuldi ikki verið heilt ómøgulig, tá hugsað verður um, at yvirtøkulógin ju byggir á Tvøroyrarskjalið, sum undanfarna fullveldissamgonga eigur við húð og hár. Nú gjørdist yvirtøkulógin til eitt klandursmál av versta slagi. Spyrjast kann eisini, hvussu breið tann breiða tjóðskaparliga semjan, sum landsstýrissamgongan fór eftir tá hon var myndað fyri meira enn einum ári síðan, nú er. Svarið er, at hon er rættiliga breið, men at semjan kundi verið væl breiðari og tað hevði verið ein ómetalig styrki fyri samgonguna. Men hinvegin kann ein skilja landsstýrið, tí hetta mál hevur tikið nógva politiska og fyrisitingarliga orku og hevur verið ein forðing fyri, at farast kundi undir at loysa tey mongu praktisku politisku málini, ið bíða eftir at verða loyst. Tað er eisini ein stórur spurningur, hvørt partarnir høvdu flut seg, sjálvt um landsstýrið hevði brúkt meira tíð til hetta málið.

Nú er yvirtøkulógin so samtykt. Henda lóg er eitt stórt stig á sjalvstýrisleið. Tað kann eingin ivi vera um tað. Lógin ásetir, at øll mál, sum ikki beinleiðis eru knýtt at suverenitetinum kunnu verða yvirtikin uttan víðari. Her verður ruddað væl og virðiliga upp í tí ruðuleika, sum tey seinastu mongu árini hevur valdað í spurninginum um, hvat ið kundi yvirtakast og hvat ið kundi ikki yvirtakast. Tað var ikki eitt samt løgting, sum atkvøddi yvirtøkulógina til húsar, men tað var ein óvanliga stórur partur av løgtinginum og tí er tað ikki heilt burturvið at tala um eina breiða semju í hesum máli. Nú er at fáa samtykt nakrar yvirtøkur, so lógin kann roynast í verki og føroyingar kunnu ásanna, at hetta er álvara. Síðan er at fara til verka og seta í verk øll tey mongu mál, sum eru sett upp í samgonguskjalinum. Her liggur so nógv á láni, at tað mest líkist atgerðarloysi. Farið til verka leggið eina strategi við nøkrum itøkiligum málum fyri øll týðandi samfelagsøki. Fái gongd á búskapin, loysið strukturtrupulleikarnar hjá fiskivinnuni og finnið eina semju um tey stóru málini t.d. privatiseringarnar, so fólk og fyritøkur vita, hvar vit flóta. Fái enda á tí óvissu, sum spakuliga breiðir seg serstakliga í vinnulívinum og síðst men ikki minst komið til sættis við fakfeløgini. Verandi klandur er ósømiligt fyri eina annars sera skilagóða og dámliga landsstýrissamongu við einum frálíkum samonguskjali.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Er Føroya Banki fiskaður niður í sand og øsku

**Mortan Johannesen**



Sjálvur eri eg nokk ikki tann rætti, at úttala meg um slíkt, og kanska heldur ikki tann rætti til, at døma um hetta, men eg havi mína meining um fiskaríið á Føroya Banka, um hon so er røtt ella skeiv er nakað annað.

Lat tað fyrst av øllum verða gjørt púra greitt, at tær skipsmanningar og skiparar, sum fiska á Bankanum avgjørt onga skuld hava í, at Føroya Banki er niðurfiskaður, teir gera sítt arbeiði bæði væl og virðiliga, og halda seg innanfyri tær lógir og reglar, sum eru galdandi, men feilirnir og skeivleikarnir eru gjørdir av teimum kvinnum og monnum sum ráða og valda í hesum landi.

Lat okkum taka eitt, av fleiri dømum, sum eru farin fram. Ein hálvrotin bátur eigur 20-30 fiskidagar á Bankanum, hesin sami bátur er kanska bara einar 4-5 dagar á Bankanum við eini 6-8 stampum, hetta er so veiðan hjá hesum bátinum fyri árið. Umrøddi bátur kann so selja sínar fiskidagar til ein stóran nýmótans línubát, sum hevur alt tað nýggjasta innan fiskitøkni. Hetta er alt rætt eftir lógini, og er tí onki skeivt gjørt hvørki av keypara ella seljara, men hvat gerst úrslitið, hesin sami gamli báturin, sum brúkar sínar 4-5 dagar á Bankanum við nøkrum heilt fáum stampum, er umbýttur við ein nýmótans línubát sum setur einar 40.000 til 50.000 húkar um dagin, ein øking í veiðitrýstinum, sum er vaksin fleiri 100 tals ferðir. Átti hetta ikki at fingið alarmklokkurnar at ringt, og allar reyðar perur at blinka.

Fyri nakað av tíð síðan, hoyrdu vit fiskifrøðingar og biologar tosa um, at koralrivini rundan um Føroyar vóru niðurbrotin, og var hetta ógvuliga harmiligt, tí tey komu ikki aftur við bræði, eg skal stilla meg í fyrstu røð saman við øðrum skiparum, at hava verið ein av teimum, sum hava niðurbrotið hesi koralriv, eg kann væl minnast eystur av Suðuroyarbankanum, eystur og suður av Munkagrunninum, hesar penu reyður koralgreinarnar, sum kundu vera upp í ein metur langar, lógu fløktar og brotnar aftur gjøgnum trolið, men ongin segði, at tað var nakað galið í hesum, vit høvdu bara tað einu uppgávuna, tað var at fáa mest møguligan fisk og harvið fortjenastu til skip og manning, meiri vit kundu fiska har, meiri var at fortjena, hetta var jú púra løgligt. Men so nógv ár aftaná, hvussu sær botnurin út, jú har eru ongar korallir, ongin kongafiskur og heldur ongin blálonga, ein partur av tí fiski, sum var har, er ikki har longur, og kemur heldur ikki aftur í okkara tíð.

Lítið nyttar, at ferðast land og ríki runt, at halda fyrilestrar um Føroya banka sum gott vakstrarøkið hjá tí stóra toskinum, tí har er ongin stórur toskur eftir, bara nakað av millumfiski og smáfiski.

Føroyabanki hevur verið illa fyri áður og niðurfiskaður, tá hava teir ráðandi politikkararnir havt rygg til at handla, og Bankin er komin fyri seg aftur, men hava teir rygg til tað nú.

Eg skal enda sum eg byrjaði, at teir sum fiska har úti, tað veri seg trolarar, línubátar ella snellubátar, hava ikki skyldina av, at Bankin næstan er farin fyri bakka.

# Tiden strømmer som rennende vann

**John Myllhamar**

Á ferð í Noregi seint í vár, vitjaðu konan og eg hjúnini Elsebeth og Per Eirik. Hon er ættað úr Fuglafirði. Tað var áhugavert at tosa við tey í hugnaliga heimi teirra í Bergen. Per Eirik hevur sera stóran alsk til Føroyar. Tað sást týðiliga, tí hann dugdi sera væl føroyskt mál, og so kendi hann fólk í nærum øllum oyggjum og nevndi tey við navni.

Hann vísti okkum eisini eina norska týðing av sálminum: Tíðin rennur sum streymur í á, eftir Fríðrik Petersen. Mær tykti hann var vællýddur, og bað eg tí um eitt ljósprent av honum. Í viðmerkingini í lagbókini stendur: Denne sangen er velkjent på Færøyene. For mange er den næsten som en ekstra nationalsang. Her foreligger den for første gang på norsk.

T.: Frederik, Petersen. O: Svein Aasmundtveit

*Tiden strømmer som*
*rennende vann,*
*flommer med bølger og*
*bårer.*
*I en liten båt langt fra land,*
*driver jeg uten årer.*

*Strømmen trekker hver tid*
*og hver stund*
*nærmere fossen og døden.*
*Hvor er hjelp, hvor finnes*
*den grunn*
*som gir feste i nøden?*

*Hvem kan berge meg,*
*hvem eier makt,*
*hvem eier vilje og evne?*
*Alle er i håpløshet brakt,*
*uten framtid å levne.*

*Det er en, uten redsel og*
*frykt.*
*Jesus har makt til å berge.*
*Han kan føre båten min*
*trygt,*
*han vil lede og verge.*

*Tiden strømmer som*
*rennende vann*
*fram mot den himmelske*
*havnen!*
*Jeg er i en båt langt fra*
*land;*
*Jesu navn er for stavnen.*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.